


*Steintór Rasmussen og Erik Biskopstøð eru tveir av høvuðsmonnunum handan SummarFestivalin. Saman við Gunnvá Gaard, samskipara, fegnast teir um stóra áhugan, sum er fyri festivalinum*
*Mynd: Høgni Thomsen*

# Tað verður fult hús

**Áhugin fyri Summar Festivalinum er størri enn nakrantíð áður. Fleiri enn 6.000 atgongumerki eru longu seld, og góðu veðurforsøgnirnar borga fyri framhaldandi góðari sølu**

TÓNLEIKUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í kvøld byrjar Summar Festivalurin, og lagt er upp til eitt brak av einum festivali. Summar Festivalurin hevur víðkað skránna, og hesaferð verða framførslur og undirhald á fýra pallum í tríggjar dagar.

Útlendskar stjørnur sum Melanie C, Alphabeat og Smokie skulu spæla saman við spennandi føroyskum nøvnum sum Kára P, The Dreams, Lindu Andrews, Húskallum og Páll Finnur Páll.

Áhugin fyri Summar Festivalinum er so stórur sum ongantíð áður. Í gjár vóru fleiri enn 6.000 atgongumerki seld, og atgongumerkjasølan gongur framvegis væl. Veðurmenninir siga frá góðum veðri, og tí er líkt til, at tað leggjast nógv fólk afturat. Tað verða seld í mesta lagi 8.000 atgongumerki til festivalin í ár.

Norðoya Kunningarstova hevur eisini havt trupult við at fylgja við mongum umbønunum um pláss til husvognar, bátar og tjøld, og øll pláss á gistingarhúsum og summarhúsum eru langt síðani umbiðin.

## Fólk koma úr øllum ættum

Fyrireikararnir av Summar Festivalinum fegnast um, at fólk aftur í ár taka so væl undir við festivalinum.

- Áhugin fyri festivalinum er sera stórur, og vit rokna við nógvum fólkum allar festivaldagarnar. Tað er hugaligt at uppliva, at Summar Festivalurin kann samla so nógv fólk í øllum aldri úr øllum ættum, og vit gleða okkum til geva fólki eitt ordans upplivilsi, sigur Steintór Rasmussen, fyrireikari av Summar Festivalinum.

- Tá so nógv fólk skulu á festival, er umráðandi at fólk koma í góðari tíð, um tey skulu hava armband uppá við inngongdina. Tað kann koma fyri, at fólk mugu bíða eina løtu fyri at sleppa inn, og tí heita vit á fólk um at koma í góðari tíð áðrenn stóru nøvnini fara á pallin, sigur hann.

Fimti Summar Festivalurin er tann mest víðfevndi festivalurin, sum hevur verið. Hesaferð verða fýra pallar í brúk í tríggjar dagar, og Silvalandið er útbygt við fleiri og nýggjum tilboðum til teir yngstu festivalgestirnar.

## Ljóð enn betri

Nógvur verður gjørt burtur úr tøknini til festivalin, og ljóðanleggið til stóra pallin er tað størsta nakrantíð. Í fjør setti Scorpions hørð krøv um ljóð, men hóast krøvini ikki eru tey somu í ár, so hevur festivalurin sjálvur valt at halda fast um høga ljóðstøðið, og anleggið í ár er enn størri, enn tað var í fjør.

- Vit leggja stóran dent, at fólk fáa eitt gott upplivilsi, og at øll síggja og hoyra væl. Vit hava betra ljóðpartin á øllum pallunum, og nú hava vit stórskíggjar bæði á Vágsbøi og í Flags tjaldinum, sigur Erik Biskopstø, fyrireikari.

Danski ljóðtøkningurin Anders Feldin, sum ger ljóð til stórar konsertir í festivalar, stendur fyri ljóðinum á stóra pallinum. Royndi tøkningurin Hans Andor Johannesen samskipar ljóðpartin, og royndir tøkningar sum Jónas Bloch Danielsen, Ingi Isaksen og Alexander Gaard Joensen eru við í arbeiðnum, og fremsti føroyski ljósmaðurin, Egil Barcley Høgenni Hansen, stendur fyri ljósinum til stóra pallin.